# Ikki komnir til málsbýtið enn

**- Tað verður neyvan fyrr enn sunnudagin ella kanska fyrst í komandi viku, at vit koma fram til býtið av málsøkjum og telving um løgmann, sigur Kaj Leo Johannesen, formaður í Sambandsflokkinum**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Menn eru framvegis bjartskygdir um eina ABC-samgongu.

- Eg haldi, at samráðingarnar ganga ógvuliga væl, og vit hava fingið semju á fleiri økjum, segði Kaj Leo Johannesen, tá Sosialurin tosaði við hann í morgun, undan at flokkarnir hittust klokkan tíggju í løgtingshúsinum.

Eitt mál, sum náttúrliga semja neyvan er um, er spurningurin um ríkisstuðulin og ein møguligur niðurskurður av honum.

- Tað er eitt mál, sum hava tugt og tannlað leingi. Og eg meti, at vit nærkast eini orðing, sum allir tríggir flokkar kunnu liva við. Vit eru í hvussu er samdir um, at føroyski búskapurin skal vaksa í tann mun, vit minka blokkstuðulin, sigur Kaj Leo Johannesen.

Hann vísir á, at tað júst var feilurin, tá blokkurin seinast varð skorin niður.

Fíggjarlógin hevur verið uppi og vent, men tað er ikki eitt mál í hesum samráðingunum.

- Fíggjarlógaruppskotið verður ikki viðgjørt í smálutum, fyrr enn ein samgonga er skipað. Tástaðni fara flokkarnir at tingast um fíggjarlógina, sigur Kaj Leo Johannesen.

Eitt annað mál, sum dentur hevur verið lagdur á, er trivsilin hjá teimum alment settu starvsfólkunum.

- Tað er neyðugt, at tey alment settu starvsfólkini verða motiverað, heilt frá ovastu leiðslu og allan vegin niður gjøgnum skipanina. Tí kenna starvsfólkini ikki, at tey hava ein gevandi arbeiðsdag, kunnu tey heldur ikki veita eina gevandi tænastu til borgaran, sigur Kaj Leo Johannesen.

### Einki býti enn

Jóannes Eidesgaard, løgmaður, hevur fyrr verið frammi í fjølmiðlunum og sagt, at hann væntar at kunna vísa fram eina skitsu av einum samgonguskjali, men uttan beinleiðis at mótsiga hesum, so væntar Kaj Leo Johannesen, at flokkarnir fara at samráðast alt vikuskiftið og kanska inn í komandi viku.

Hann sær kortini ikki teir stóru snávingarsteinarnar á vegnum, men sum tað so ofta er ført fram, so taka summi mál drúgva tíð, meðan onnur glíða lætt ígjøgnum.

Spurdur um, nær samráðingarnar koma hartil, at málsøkini – íroknað løgmanssessin – verða býtt sigur hann, at tað ikki verður beinanvegin.

- Helst fer vikuskiftið at ganga, áðrenn vit koma hartil. Kanska einaferð sunnudagin, kanska ikki fyrr enn fyrst í komandi viku, sigur Kaj Leo Johannesen.

Tingfundur er settur at verða týsdagin í komandi viku, og gongur sum teir tríggir floksformenninir vænta, verður ein nýggj samgonga skipað tá, og klárt verður til eitt nýtt nevndarval til tingnevndirnar.



*Kaj Leo Johanesen væntar ikki, at býtið av málsøkjum verður viðgjørt fyrr enn í fyrsta lagi sunnudagin*

# Útróðrarbátarnir lakan fiskiskap

**Tað er ikki nakar rokfiskiskapur hjá útróðrarbátunum í løtuni. Teir flestu liggja um 50 pund upp á stampin, og tað er í minna lagi**

ÚTRÓÐUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Tað er ógvuliga misjavnt sum tað roynist hjá útróðrarbátunum í løtuni. Flestir liggja um 50 pund upp á stampin, og tað er í lakara lagi.

Ein útróðrarmaður, Sosialurin hevur tosað við, sigur, at soleiðis er fiskiskapurin hjá teimum flestu fyri tíðina.

- Vit hava roynt inni undir landi og vit hava verið heilt eysturi móti kantinum (á landgrunninum, góðar 20 fjórðingar úr landi, blm), heilt eysturi á 90 favna dýpi, men tað vísir seg at vera sama skilið allastaðni. Tað er kanska enntá verri, longur út tú fer, sigur Bárður Poulsen, sum saman við bróðrinum Rúna rekur 38 fót AWI-bátin, Tóru úr Nólsoy.

Vit hittu Bárð, tá hann var á Bacalao eftir upsahøvdum, sum teir nýta sum agn í goggurúsunum, ið teir seta út fyri Nólsoynni.

Vanliga verður sagt, at toskurin dámar betri goggu, meðan tað er meiri hips um haps hvat hýsan tekur. Eitt annað er so eisini, at teir, sum fiska goggur sjálvir, spara munandi í agnútreiðslum.



*Bárður Poulsen lempar upsahøvd umborð á Tóru. Teir seta goggulínu og fáa harvið gott agn, samstundis sum teir spara upp agnútreiðslurnar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Hampiligt í nátt

Men Bárður Poulsen heldur, at tað kann hava sína forkláring, at so lítið er at fáa fyri tíðina.

- Fiskurin er sprenfullur av sild, og tað kann væl vera orsøkin til, at hann ikki tekur agnið, metir Bárður Poulsen.

Tóra var eisini úti síðstu nátt, og tá hildnaðist heldur frægari.

- Vit fingu smá 2000 pund á 27 stampum. Vit vóru tætt undir landi, settu tvær setur, aðra út fyri Urðini, og hina norðuri í Álinum. Slagið var gott, ein kassi (um 600 pund, blm) av toski og tveir av hýsu, sigur Bárður Poulsen.

Vanliga royna teir mest eystanfyri, har teir náttúrliga eru best kendir, men liggur hann við eysturætt og vindi, fara teir vestur um á Bøin og aðrar leiðir vestanfyri.

- Tað hevur verið so seinastu tíðina, at onkur bátur kann hava dottið fram á eina setu við 100 pundum upp á stampin, men so er alt burturi dagin eftir, sigur Bárður Poulsen.

Nú lá fiskiskapurin so um 75 pund upp á stampin, so kanska er tað um at blíva frægari við fiskarínum hjá útróðrarbátunum.